# Vinnulívsráðið í gongd aftur

**Ikki hevur nógv verið at hoyrt frá Vinnulívsráðnum í Klaksvík ta seinastu tíðina, men fyri stuttum varð ráðið skipað av nýggjum**

VINNULÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ráðið varð av fyrstani tíð sett á stovn í 1991, men síðan seinasta aðalfundin hevur vinnulívsráðið í Klaksvík ikki verið nakað virkið felag.

Fyri stuttum kom nevndin tó saman aftur, og skipaði hon seg á tí fundinum. Nevndin, ið sett varð á aðalfundinum í 1999, sær í dag soleiðis út :

Jógvan við Keldu, býráðspolitikari, sum hevur verið við frá byrjanini í 1991, hevur tikið við sum formaður í Vinnulívsráðnum.

Afturat honum er Símun á Høvdanum, næstformaður, Karl Birgir Isaksen, kassameistari, Rani Nolsøe, skrivari og Palli Ziskakon, nevndarlimur.



### Skipar fyri fyrilestri

Longu komandi hósdag skipar Vinnulívsráðið saman við Klaksvíkar Handilsfelag fyri einum spennandi fyrilestri um undirsjóartunnil.

Borgarstjórin á Akranesi í Íslandi kemur til Klaksvíkar at greiða frá, hvussu undirsjóartunnilin undir Hvalfjørðinum hevur ávirkað virksemi og annað á Akranesi.

Frá Símun á Høvdanum, næstformanni í Vinnulívsráðnum, frætta vit, at hetta bert er ein av fleiri fyrilestrum, ið ráðið ætlar at skipa fyri.

- Nevndin hevur samtykt, at endamálið nú er at fáa felagið at gerast aktivt aftur, sigur Símun.

- Vit ætla at skipa fyri fleiri fyrilestrum og øðrum tiltøkum, og samstundis vísa meir andlit út at til, sigur næstformaðurin.

### Samskipari

Vinnulívsráðið varð av fyrstani tíð sett á stovn við tí endamáli at skipa fyri ymiskum tiltøkum, at verða savnandi og samskipari av vinnu- og handilslívinum í Norðoyggjum.

Tó hevur ikki verið nógv at hoyrt frá ráðnum ta seinastu tíðina, men hetta møguliga broytist, nú ráðið hevur skipað seg av nýggjum.

# Fyrilestur um undirsjóvar-tunnil



**Hóskvøldið verður forkunnugur fyrilestur um undirsjóartunnil hildin í Tekniska Skúlanum í Klaksvík**

FYRILESTUR
*Ragnhild Ellinsgaard*

**Sosialurin:** Tað verður borgarstjórin í Akranesi í Íslandi, Gísli Gíslasonur, sum fer at halda hendan fyrilestur komandi hóskvøld.

### Undirsjóartunnil

Gísli Gíslasonur fer millum annað at greiða frá, hvørja ávirkan undirsjóartunnilin undir Hvalfjørðinum hevur havt uppá Akranes.

Sum skilst, fer hann at tosa um, hvussu handilslívið í býnum er broytt, og eisini hvussu samstarvið á sjúkrahúsinum á Akransesi er, nú trý ár eru liðin, síðani undirsjóartunnilin kom.

Harafturat kemur hann eisini inn á, hvussu menningin viðvíkjandi ymsum økjum er farin fram í býnum, eins væl og hann kemur at greiða frá, hvørji krøv, ein undirsjóartunnil setur til fólkið og vinnulívið í býnum.

### Vitjað fyrr

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Gísli Gíslasonur vitjar í Klaksvík. Í 1996 hevði hann eisini ein fyrilestur, og hava vit frætt, at tann fyrilesturin var væl vitjaður. Tískil meta fyrireikararnir eisini, at nógv fólk koma at lurta eftir Gísla hóskvøldið.

### Almennur

Fyrilesturin verður almennur, og skulu øll verða vælkomin at lurta.

Tað eru Klaksvíkar Handilsfelag og Vinnulívsráðið í Klaksvík, sum í felag hava boðið Gísla Gíslasyni hendan vegin.

Fyrilesturin verður á Tekniska Skúlanum í Klaksvík hóskvøldið tann 14. mars klokkan 19.00.

# Kavin tarnar fótbóltinum



**Tann nógvi kavin í Klaksvík tarnar fótbóltsvenjingini hjá fyrstu deild monnum hjá KÍ**

KAVARUDDING
*Solby A.Eliasen*

- Vit hava bert verið á grønum vølli tríggjar ferðir, síðani vit byrjaðu at venja 20. januar, sigur venjarin hjá KÍ, Kurt Mørkøre.

- Men enn venja vit fyri tað mesta kondi, og tá bilar ikki, um kavin liggur, greiðir Kurt frá.

### Kommunan gjørt alt teir kunnu

Men í vikuskiftinum hevði kommunan lænt eina maskinu frá Landsverkfrøðinginum, sum blæsir kavan burtur. Og hon bleiv nýtt til at rudda umleið hálvan vøllin.

- Kommunan hevur gjørt alt tað, teir kunnu, sigur Heri Ellingsgaard, nevndarlimur í KÍ. Allir hugsaðir møguleikar hava verið umrøddir. Men vandin fyri at oyðileggja graslíki er stórur, og er kavin tí sloppin at liggja, greiðir Heri frá. - Hetta er so sera stórar mongdir av kava, sum talan er um, hevði ivaleyst fylt eini tvey – trý hundrað bingjur.

- Vit kunnu ikki bert rudda kavan av vøllinum, tá hann er so nógvur. Vit mugu eisini hava onkrastaðni at koyra hann, heldur Heri fram.

- Tað var so hugaligt leygarmorgunin at síggja at kavin var minkaður so frætt, at tað kundi loysa seg at læna eina maskinu frá Landsverkfrøðinginum, sigur Heri Ellingsgaard. Men longu aftur sunnumorgunin var eitt hvítt kavalak á vøllinum.

### Klaksvíkskappingin avlýst

Farna vikuskiftið skuldi so Klaksvíkskappingin verið, men vegna allan kavan, so bleiv hon avlýst. Eisini undan umførini til kappingina um Løgmanssteypið vórðu avlýst. So ikki kann annað sigast enn, at kavin ger sanniliga sítt til at fótbólturin hevur eina stirvna byrjan í ár.

### Venja kortini úti

Hóast alt hetta, so hava KÍ-leikararnir, sum sagt, vant á vøllinum.

- Vit vóru á vøllinum í gjárkvøldið, sigur Kurt Mørkøre.

- Tað var trupult at venja, tí vøllurin var frystur, so menn gliðu illa, men til bar kortini.

- Vit hava spælt tveir venjingardystir, og komandi hóskvøld skulu vit út til Runavíkar at spæla ein venjingardyst móti NSÍ, sigur venjarin hjá KÍ at enda.







*Gamli verkstaðsbygningurin hjá Gunnleivi Danielsen er nú keyptur av luthersku frímeinighetini í Hoyvík. Hann verður nú brúktur av meinigheitini til møti, guðstænastur og annað virksemi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Verkstaður vorðin til kirkju

**Gamli virkisbygningurin, sum Gunnleivur Danielsen brúkti til verkstað, er nú seldur eini meinigheit í Hoyvík, og verður hann nú brúktur, sum samkoma hjá teimum, sum kallað seg ein luthersk frímeinigheit**

*Ingrid Bjarnastein*

Bygningurin kostaði 3,5 milliónir krónur, men við øllum sum skal gerast afturat, so liggur hann longu nú um 4,2 milliónir, og nógv vantar enn í.

– Grundin til, at vit hava valt at gera soleiðis er, at tørvurin er vaksin, og soleiðis sleppa vit eisini frá at rigga til, og rigga av hvønn sunnudag tá vit hava møti. Vit hava hildið til í skúlanum í Hoyvík frammanundan, og at skula fyrireika so nógv undan hvørjum møti kann verða rættiliga stríggið í longdini, sigur Jóni Johannesen, fyristøður í meinigheitini í Hoyvík.

Meinigheitin hevur ikki fingið nakran stuðul frá tí almenna. Knøpp millión áttu tey í eginpeningi at seta í, og restin er síðani fíggjað ígjøgnum lán. Søkt hevur verið um stuðul ymsastaðni frá, men higartil eru bert noktandi svar komin teimum í hendi. Men bíðað verður enn eftir onkrum svarið afturat.

### Nógv virksemi

Meinigheitin hevur verið til í 21 ár, og hava tey fyri tað mesta hildið til í skúlanum í Hoyvík. Fyrr varð sagt, at tey hoyrdu undir luthersku fólkakirkjuna, men nú hava tey valt at kalla seg eina lutherska frímeinigheit ístaðin. Hvørt mánakvøld er bønarmøti á skránni. Hóskvøld hevur ungdómurin ungdómsmøti og sunnudagar er sunnudagsskúli og møti um kvøldið.

– Vit eru eisini byrjað at hava guðstænastur sunnumorgnar nú, og tað ætla vit at halda áfram við. Í fyrstuni verður tað nokk ikki hvønn sunnudag, men vit fara at royna at byrja uppá hetta so við og við, greiðir Jóni Johannesen frá.

– Eisini plaga vit at hava eitt, sum eitur Alfa-skeið. Tað er ein onglendingur, sum eitur Nick Commel, sum er komin við tí, og tað verður nógv brúkt kring heimin. Eitt tílíkt skeið koyrir í eini 10 dagar.

Umstøðurnar hjá luthersku frímeinigheitini eru eisini nógv betri nú. Verkstaðsbygningurin er rættiliga stórur. 600 fermetrar og grundøkið sjálvt er 4000 fermetrar tilsamans. Alt er verri enn so ikki klárt enn. Meiri peningur skal brúkast til at fáa alt gjørt í stand, og brúkiligt hjá eini meinigheit at halda til í. Tann 10. februar í ár vóru 200 fermetrar tiknir alment í nýtslu.

Bygningurin liggur á Brekku 3, og liggur hann beint aftanfyri Mjólkarvirkið Búnaðarmanna.

# Nýtt vinnugreinafelag stovnað

Sjey feløg, sum arbeiða við lýsingarvirksemi, hava tann 8. mars stovnað eitt vinnugreinafelag. Nýggja felagið eitur Reklamufelagið, og endamál tess er at savna føroysku lýsingarstovurnar og taka sær av teirra yrkiligu og felagsligu áhugamálum. Á stovnandi aðalfundi varð nevnd vald, og í henni sita: Johnny Gaard, Petur Slyne og Høgni Rasmussen. Á komandi nevndarfundi verður nevndin skipað. Felagið ætlar at verða partur av skrivstovufelagsskapinum í Vinnuhúsinum.

# ÍSF lógin ímóti ítrótti í kirkjutíð



*Heðin Mortensen, formaður í Ítróttarsambandi Føroya, sigur, at ÍSF lógin er ímóti kappingum í kirkjutíð*

**Bjarni Bæk, dómpróstur, segði sum ein síðuviðmerking í prædikuni triðseinasta sunnudag, at hann helt, at tað var óheppið, at ítróttarkappingar viðhvørt liggja soleiðis, at tey, sum ganga til ikki sleppa í kirkju**

*Ingrid Bjarnastein*

ÍSF formaðurin, Heðin Mortensen, sigur, at sambært ÍSF lógini, so er ikki loyvt at skipa fyri kappingum í kirkjutíð.

– Vit halda okkum til ta etisku grundregluna, at ongin ítróttur hjá ítróttarsambandi Føroya fer fram í kirkjutíð, sigur Heðin Mortensen.

– Um ítróttur er fyriskipaður í kirkjutíð, so hevur hetta onki við ítróttarsambandið at gera. Men um so er, so eri eg ógvuliga harmur um tað.

Heðin Mortensen sigur eisini, at um hetta er komið fyri, so hevur ítróttarsambandið ikki verið spurt eftir.

– Men eg haldi, at dómprósturin skuldi vent sær beinleiðis til Ítróttarsamband Føroya, ístaðin fyri at siga tað soleiðis í eini prædiku. Um tað er nakar, sum er ímóti ítrótti í kirkjutíð, so er tað eg, sigur Heðin Mortensen.

Kappingarnar hjá feløgum í ÍSF kunnu liggja sunnudag, men so skulu tær liggja antin áðrenn kirkjutíð, tað vil siga frá klokkan 9 – 10 á morgni ella frá klokkan 13 og úteftir.

Bjarni Bæk, dómpróstur, hevði onga víðari viðmerking til málið, tí hann vil ikki blása tað óneyðugt upp.

# Sambandslitin í Norðurstreymoy liðugur

Sambandsflokkurin hevur kunngjørt endaliga valevnislistan í Norðurstreymoy til komandi løgtingsval. Fýra valevni eru, og eru tey:

Olav Enomoto, Vestmanna
Eirikur Dam, Streymnes
Bárður Nielsen, á Válinum
Páll Poulsen, Kollafjørður

Á seinasta løgtingsvali fekk Sambandsflokkurin 446 atkvøður í Norðurstreymoyar valdømi. Hetta er 21% av atkvøðunum.